Um Atlantis

Upplýsingar í samband við úttalilsir hjá formanninum í Klaksvíkar Sjónleikarafelag, Petur J. Eliasen, í grein í Sosialinum 26.10.2004

MENTANARHÚS
Tíðindaskriv frá Stýrinum og leiðaranum fyri Mentanarhúsið Atlantis

Í 2001 bleiv Grunnurin Sjálvsognarstovnurin Mentanarhúsið Atlantis stovnaður, og stýrið yvirtók alla skuld hjá Klaksvíkar Sjónleikarafelag, kr. 2.450.000,-. Hetta aftaná, at Klaksvíkar Kommuna hevði tikið um endan, tá ið byrðan hjá Klaksvíkar Sjónleikarafelag gjørdist ov tung.

Okkara uppgáva er at fylgja samtyktunum, gjørdar av Klaksvíkar Kommunu, sum siga:

Endamál

§2 Endamálið við grunninum er at vera karmur um mentanarliga virksemið í býnum, t.v.s. gjøgnum sjónleik, filmsfyrivísan, kvøldsetur, upplestur, sang og tónleik, fundir og annað fyri slík hús líknandi virksemi, og kunnu bólkar, einstaklingar og feløg gera nyttu av húsinum.

Dentur verður lagdur á, at virksemið verður so fjølbroytt sum gjørligt, og at virksemið tekur støði í føroyskum mentanararvi og føroyskum siði, og við tign, sum sømir seg einum mentaðum fólki.

Sambært leigusáttmálanum ímillum Mentanarhúsið Atlantis og Klaksvíkar Sjónleikarafelag, sum er galdandi til 1. juli 2006, hevur leigarin nýtslurætt til partar av bygninginum, sum fevna um kjallaran, alt árið og pallin og loftið í tann mun tiltøk felagsins leggja upp til.

Klaksvíkar Kommuna veitir Mentanarhúsinum Atlantis ein stuðul uppá kr. 500.000,- um árið. Peningurin verður nýttur soleiðis:

Rentur og avdrøg	kr. 260.000,-
Løn leiðarin	kr. 240.000,-
Íalt	kr. 500.000,-

Afturat hesum skal Mentanarhúsið Atlantis av við aðrar útreiðslur, so sum trygging, olja, ravmagn, telefon, bókhald, grannskoðan o.m.a., sum íalt eru uml. kr. 250.000,-.

Biografurin, ið hvílur í sær sjálvum, hevur verið ein týdningarmikil partur, tá ið hugsað verður um at fáa fólk at vitja húsið. Tó eru tað mest tey ungu, sum higartil hava vitjað biografin, og meta vit hetta at vera eitt gott tilboð til tey ungu í býnum.

Vit vilja vera við til at gera karmarnar so góðar sum gjørligt fyri tey, sum vitja húsið, og hava tí innrættað salin av nýggjum, betra um pallin við m.a nýggjum baktjøldum, hugna um foyeri, fingið eitt gott "sourround" anlegg og nýggja peru í framvísaran, soleiðis at bæði ljóð og myndagóðska er í topp.

Leiðarin hevur roynt at skipa fyri ymiskum øðrum tiltøkum, har undirtøkan hevur verið misjøvn. Tó fella vit ikki í fátt. Vit hava gjørt avtalu um samstarv við Norðurlandahúsið/films felagið Klipp og Mentanarhúsið í Fuglafirði. Vit eru í fer við at fáa permanenta ljóð útgerð í húsið, umframt "sourround" anleggið, sum longu er komið. Eisini er eitt nýtt klaver í húsinum eins og uppvørpa, sum fer at verða nýtt til reklamur, áðrenn filmarnir byrja. Hetta fer at vera eitt figgjarligt ískoyti til virksemi í húsinum.

Leiðarin hevur samskipað tiltøkini, og er tað eingin trupulleiki at hýsa tiltøkum, sum eru uml. 2-3 tímar til longdar, samstundis sum biografurin koyrir eftir ætlan, nær tað skal vera!!!

Venjingarumstøðurnar eru ikki tær bestu, og kemst hetta av, at einki høli er burturav til at venja í. Vit vilja tó gera framførslu umstøðurnar so góðar sum gjørligt.

Tað kann kennast svárt, tá ið nakað, ein hevur verið við til at bygt upp, gleppur einum av hondum. Tíðin stendur ikki í stað, og vit verða øll noydd at hyggja frameftir.

VIÐMERKINGAR

Til det færøske lagting i anledning af den færøske abortlovgivning

Maria Juhl Hansen
Cand. jur

Jeg har længe gået og tænkt, at jeg godt kunne tænke mig at stille jer nogle spørgsmål. Det lader til at I har svarene på en del af de spørgsmål, som menneskeheden har stillet siden den blev til.

I lader for eksempel til at vide, hvornår menneskesjælen bliver til. Ved I også, hvor den kommer fra? Eller hvor den bliver af bagefter? Ved I hvordan den bliver til?

Jeg tror egentlig, at vi er enige om, hvornår vi tror, livet starter. Jeg tror, at det starter ved undfangelsen. Der hvor jeg tror, at vores veje skilles er, når I lader til at mene, at der er tale om et menneske fra undfangelsen, at det er ligeså beskyttelsesværdigt som sin vært.

I den vestlige verden anser vi traditionelt ikke – i modsætning til visse kulturer i østen – alle liv for beskyttelsesværdige. Mennesker og visse højerestående pattedyr er beskyttet, men allerede ved den sidste gruppe bliver situationen mudret. Vi kræver en vis form for sjælsudvikling for at anse et liv for beskyttelsesværdigt.

Har et foster inden tolvte uger så det? Efter min opfattelse er svaret nej. Et foster på dette stadie hedder i lægefaglig terminologi et embryon. Det betyder celledeling på græsk. På dette tidspunkt er livet en celledeling i en kvindes livmoder ligesom, så mange andre celledelinger i hendes krop. Hvis ikke der bliver grebet ind i denne enten fra naturen (eller Vorherre om man vil) således, at celledelingen går i stå og fosteret aborteres spontant eller, der gribes ind fra menneskelig side, og man vælger en provokeret abort vil denne celledeling i løbet af ni måneder udvikle sig til et barn. Men det er ikke det samme som, at det allerede inden tolvte uger, har det sjæleliv, der kvalificerer til betegnelsen et barn.

Efter min mening bliver en situation med kolliderende rettigheder. Hvor hensynet til det levende fuldtudviklede menneske langt overstiger hensynet til en celledeling, der er fuldstændig afhængig af en "vært" for at overleve. Det kan på trods af al moderne teknologi ikke holdes i live uden for moderen. Alene det er for mig et vægtigt argument for, at fosterets liv ikke bør tillægges samme vægt som moderen.

Der er endnu en ting, som jeg synes, at abortmodstanderne kunne overveje. Nemlig, hvad det gør ved fosterudviklingen at vokse i en kvinde, der er syg af sorg og angst. For man skal jo huske, at de første til at pege fingre af kvinder, der får abort, ofte også er de første til at fordømme den pige, der kom galt af sted

Nu bedes læseren lægge mærke til en ting. Da jeg skrev om livets opståen og fosterets sjælsudvikling, skrev jeg, "efter min mening". Det er væsentligt, fordi jeg ikke forsøger at tage patent på, hvordan og hvornår livet begynder, slutter og hvad der sker før og efter. Det kan jeg ikke, og det ønsker jeg ikke. Derfor ønsker jeg heller ikke at bestemme, hvorvidt andre mennesker skal gennemføre et svangerskab, eller de skal afbryde det. Det kan jeg ikke. Der er for mange store spørgsmål, som jeg ikke kan give et endegyldigt svar på. Selv om jeg er kristen, bilder jeg mig nemlig ikke ind, at jeg har patent på sandheden. Netop derfor ønsker jeg et frit valg for det enkelte menneske til at afgøre disse spørgsmål med sig selv og på baggrund heraf træffe sit valg. Jeg mener, at det er spørgsmål af en karakter, som ingen kan afgøre for andre. Det er svært nok at afgøre med sig selv.

Sidst men ikke mindst burde I måske tænke lidt over, hvem det var, Kristus kom hos, da han vandrede på jorden. For så vidt jeg husker, var det meget sjældent hos folk, der dyrkede loven frem for kærligheden. De kendte nemlig eri tað ikki mentur.

Sum fostur sóu eygu tíni meg, og í bók Tíni stóðu teir allir uppskrivaðir, dagarnir, ið ásettir vóru, áðrenn nakar av teimum enn var komin. Sálmur 139 versini 6 og 16«.

Ófatuligt

Richard Danielsen

Nú hoyrir man aftur og aftur, trúttað niður í okkum, serliga av nøkrum kvinnum, at kvinnan má sjálv ráða yvir sínum likami. Vit mugu nokk øll ásanna, um vit nú trúgva á Bíbliuna ella ikki, at lívið er undurfult, óskiljandi, tað er nakað høgt, langt yvir okkum, ófatuligt. Hvussu verða beinini til í móðurlívi, hvar kemur lívið frá. Hví eru vit her, hvat er endamálið við okkum. Heimspekingar hava kanska roynt at granska hetta, men hetta er ikki til at finna út av, vónleyst vit klára tað ikki. Her standa vit á nullinum, um man so má siga.

Og so verður tað gjørt so lætt av nøkrum, at um tey sosialu viðurskiftini ikki eru til vildar, ja kanska bara tað at hetta kann forða einari útbúgving, so skal kvinnan steðga hesum undurverki í likami sínum.

Vit, sum trúgva á Gud, sum hann hevur opinberað seg í skriftunum, vilja rópa í móti hesum. Hetta fær meiri og meiri vald á fólki okkara. Eg vil tí vera við í tí skaranum, sum rópar varskó ímóti hesum.

Um tú ikki ert ein persónligur trúgvandi, frelstur ella kanska heldur ikki tekur Bíbliuna í álvara, hav tó virðing fyri tí, sum tú einki skilir av!

»At skilja hetta er mær ov undurfult; tað er ov høgt,

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við

Innsent tilfar
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

VIÐMERKINGAR

Viðmerking til Konjukturfrágreiðingina frá Búskaparráðnum 2004

Óli Hansen
nevndarformaður í United Seafood

Sum flest øllum kunnugt, so hevur føroyska fiskivinnan á landi tað trupult í hesum døgum og nú sær út til, at vinnan hevur fingið enn ein trupulleika at dragast við; nevniliga árligu frágreiðingarnar frá Búskaparráðnum.

Nú um dagarnar kom so seinasta Konjukturfrágreiðingin frá Búskaparráðnum fyri 2004. Frágreiðingin er ikki serliga drúgv í mun til frágreiðingina, ið kom í 2003; men hóast tað, so er vorðið pláss til fleiri álvarsligar pástandir í frágreiðingini.

Frágreiðingin fyri 2003 sermerkti seg við meir ella minni at avtaka framleiðslu av fiski á landi í Føroyum. Við óvanliga ráari libralistiskari hugsjón varð tilrátt, at bert ótarnað kapping skuldi avgera, um vit skulu hava eina flakavinnu á landi yvirhøvur.

Trupult er at finna nakran reyðan tráð frá 2003 til 2004 frágreiðingina. Í frágreiðingini fyri 2004 verður lagt á heilt annan bógv og førir Búskaparráðið seg nú fram við einum óvanligum djúpum innliti í føroysku fiskavirkingina á landi. Serliga um fyritøkurnar United Seafood, sum Framtaksgrunnur Føroya eigur, og Kósina, sum Føroyagrunnurin eigur, tykist vitanin at vera sera gjøllig.

Á síðu 5 verður sagt, "at tá bæði Fiskavirking (United Seafood) og Kósin eru almennar fyritøkur, eru tær ikki eins kravmiklar um avkast av eginpeninginum, sum vóru tær privatar fyritøkur".

Um hetta er fyrst at siga, at Búskaparráðið hervið fer ógvuliga lætt um tann veruleika, at tað er ein sjálvstøðugur vinnurekandi grunnur, ið eigur United Seafood, og tað er óheppið, at ráðið í sínum metingum ikki virðir tey mørk, ið hervið eru sett frá politiskari síðu.

Tað sæst ikki hvaðani Búskaparráðið hevur hesa vitan. Tað kann tó staðfestast, at Búskaparráðið hevur ikki verið í samband við Framtaksgrunnin ella United Seafood um evnið, og tað kann neyvan verða eitt sjálvsagt facitt, at vinnurekandi grunnar pr. definitión ikki krevja optimalt avkast av sínum ilegum.

Tó so: Búskaparráðið hevur í fjølmiðlunum sagt frá, at frágreiðingin ikki er heilt álítandi, tí góð og dagford hagtøl mangla í Føroyum. Niðanfyri kann borðreiðast við nøkrum hagtølum fyri United Seafood, sum eru álítandi, og keldan er almennu roknskapirnir fyri felagið árini 1997-2003.

Her sæst, at eginpeningurin í 1997 var kr. 60 mill. og at hann við roknskaparlok 2003 var kr. 117 mill. Afturat hesum er útgoldið vinningsbýti í 2001 og 2002 á íalt kr. 12 mill.

Eginpeningurin í United Seafood er sostatt í tíðarskeiðnum frá 1997 til 2003 forrentaður við 115% ella 16% p.a.

Havast skal í huga, at framsleiðslutólini á United Seafood í 1997 vóru fullkomuliga niðurslitin. Hóast tað, so hevur verið ein virðisvøkstur í hesum tíðarskeiðnum uppá kr. 1.345 mill., samstundis sum vit hava havt eitt stabilt arbeiðspláss, ið hevur útgoldið kr. 119 mill. í meðal í lønum um árið.

Hesi hagtøl boða klárt frá, at felagið verður rikið eftir somu krøvum, sum verða sett í vinnulívinum annars.

Tá Búskaparráðið hevur eina heilt aðra fatan av forrentningskravinum, eru vit, sum varða av felganum, sjálvandi forvitin eftir at vita, á hvat grundarlag pástandurin er bygdur!

Á somu síðu postulerar Búskaparráðið eisini, at tað, at tað almenna eigur partar av fiskivinnuni á landi "kann føra til eitt skrædl, sum verður alt ov stórt í mun til tað, sum neyðugt var".

Hetta postulat er sjálvandi við til at skaða umdømi hjá nevndu felogum uttanlands, tí hvørjir kundar kunna líta á ein veitara, sum stendur fyri tilíkum hóttafalli?

Tað er óheppið, at Búskaparráðið hervið syngur fyrsta tenor í kórinum, har manglandi einskiljing er orsøkin til øll vandamál í fiskivinnuni. Annar tenorur hevur longu stemmað í við harðari rødd. Tað sóu vit á forsíðuni á Dimmalætting 20. oktober 2004, har formaðurin í Ráfiskaseljarafelagnum fær skúgvað trupulleikarnar við skipanini av uppoðsøluni yvir á manglandi einskiljing.

Í tíðarskeiðnum frá 1997 til 2003 eru íløgur gjørdar í rakstrargøgn og menning fyri íalt góðar 100 mill., og tá hugt verður at, hvussu United Seafood hevur forrentað sín eginpening í sama tíðarskeiði, er ilt at siggja, hvat fyri "skrædl" sipað verður til. Aftur her manglar grundgevingin hjá Búskaparráðnum fullkomiliga! Og tað boðar frá ábyrgdarloysi, at tveita um seg við tílíkum ógrundaðum postulatum, fyritøkunum til stóran skaða.

Búskaparráðið skal fáa viðhald í, at rættast hevði verið at einskilt almennu fyritøkurnar, so sleppast kann undan, at almennir myndugleikar taka sær rætt til at leggja seg út í smálutir hjá fyritøkunum. Og vit kunnu gleðast yvir, at tann fyrsta ítøkiliga søluætlanin er gjørd, nevniliga fyri United Seafood. Vónandi fara vit at síggja fleiri ítøkiligar ætlanir í framtíðini, eisini fyri tær fyritøkur, sum tað almenna eigur beinleiðis.

Á síðu 7 í frágreiðingini vísir Búskaparráðið aftur sítt gjølliga innlit í fiskivinnuna á landi, og sagt verður frá, at kappingin fyri ávísar frystar vørur er vorðin munandi torførari, tí "serstakliga kinverskar og eystureuropeiskar fyritøkur hava fingið fastatókur á sama marknað, har føroysk fiskavirki selja." Og á síðu 5 verður sagt: "Tí áttu vit at væntað eina stigvísa tillaging til broyttu viðurskiftini."

Á United Seafood kann í hvørt fall staðfestast, at tað er ikki kappingin frá kinverjum ella eystureuropearum, sum er størsti trupulleikin. Størsti einkultu trupulleikarnir í løtuni eru:

- lági dollarakursurin og
- høga kostnaðarstøði í Føroyum í mun til t.d. Skotland og Ísland.

Hvat Búskaparráðið veit um tillagingina í vinnuni kann bert gitast um; men staðfestast skal, at Búskaparráðið ongantíð hevur verið á gátt ella sett seg í sambandi við United Seafood í samb. við frágreiðingina 2004.

Ein undrast á, hvaðani Búskaparráðið fær sína vitan, og tað er ikki sørt at ein stendur eftir við kensluni av, at borðreitt verður við einum skrivstovuveruleika, heldur enn einum veruleika, ið lættliga kann fáast til vega við tøttum samskifti við vinnuna.

Tað er ikki sørt, at torført er at taka frágreiðingina fyri 2004 í álvara, og beint sum ein ivaðist mest í hesum, kom formaðurin í Búskaparráðnum til hjálpar og váttaði, at ein var ikki farin heilt av leið. Í Útvarpi Føroya hin 19. oktober 2004 segði formaðurin í Búskaparráðnum, at tað, sum gjørt var, var " ..ikki nóg nágreiniligt, ...ikki nóg nøjagtigt, ...ikki nóg trúverdugt" og "eg seti spurnartekin við alt hjá okkum".

Og í hesum er undirritaði púra samdur.

Tjóðveldisflokkurin dømdur at rinda fullu upphæddina fyri valstríðið til Team 85

TÍÐINDASKRIV
frá flokksskrivstovu Tjóðveldisfloksins

Dómur er nú fallin í sakarmálinum, sum Team 85 reisti mótvegis Tjóðveldisflokkinum fyri kostnaðin av valstríðnum til løgtingsvalið 2002.

Tjóðveldisflokkurin hevði noktað at rindað fulla upphædd fyri lýsingarherferðina til løgtingsvalið 2002, tí flokkurin metti seg í fyrsta lagi at hava eina avtalu við lýsingafyritøkuna um ein fastan prís, og í øðrum lagi, at nógv umrødda lýsingin í Sosialinum valdagin, oyðilegði samlaða virðið á lýsingaátakinum.

Team 85 kravdi at fáa alla upphæddina, men hevði ikki sent rokning fyri lýsingina í Sosialinum valdagin.

Dómurin gevur Team 85 viðhald í, at Tjóðveldisflokkurin skal gjalda fulla upphædd fyri lýsingarherferðina - tó við undantaki av eini minni rokning fyri eitt telduprogramm, sum fyritøkan hevði kravt Tjóðveldisflokkin eftir.

Í fyrsta lagi heldur dómarin ikki at hevði verða prógvað, at avtalaður varð ein fastur prísur.

Í øðrum lagi vísur dómarin á, at Team 85 hevur ikki kravt gjald fyri umrøddu lýsingina, og at grundarlag er ikki fyri at halda, at lýsingin hevur havt við sær eitt mist virði ella tap, sum kann geva niðursettan prís ella endurgjald til Tjóðveldisflokkin.

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum, Høgni Hoydal, harmast um dómin og hevur hesar viðmerkingar:

- Eg hevði vónað at vit fingu ein avsláttur í prísinum, tí vit halda okkum hava fingið eina sera ringa viðferð frá lýsingarfyritøkuni, og vit halda, at umrødda lýsingin hevur verið sera skaðilig fyri alt valstríðið og fyri flokkin. Men eg noyðist at taka dómin til eftirtektar og ásanna, at løgfrøðin sigur nakað annað.
- Tað einasta eg kann fegnast um í hesum máli, er at málið nú er lýst til fulnar í einum dómi, og at vit við dóminum hava fingið eitt skjal sum greiðir frá allari gongdini við lýsingarátakinum og teirri nú so kendu lýsingini.

Tjóðveldisflokkurin hevur sett pening av til eitt møguligt tap í málinum og kann tí greiða sínar skyldur.

Kertulogin skæri

Sólmundur Joensen

Lítillátin lítil logi
kertur sjónligar at sjá
spennist sterki lívsins bogi
móti hæddum há

margfaldar kertur at skoða
brúsandi bryggjubál
anandi nakrar loga
allar tó náa á mál

nátt og dag sjá kertur loga
sum havaldur vetrardag
skolandi í iðu, boða
kvøður vetrarsins haróbaldna lag

brennandi kertur sum streymharðar íðir
lívið gerst skært og bjart
geisandi kertur sum grønkandi líðir
djúpan, reinan kærleika fært

veldigu kertur – strálandi víða
login tagnar alt ov brátt
ljómfylta lag í hæddir stíga
brimandi kerta fræið sátt

kertur slóknað – náttarmyrkur
ljómandi kertur minnist eg
lívsins megi og styrkur
sýndu mær kærleikans veg

hjartar kertur geva – fáa
fylla hjørtu – gleði, frið
kærleikansmálið vilja náa
kertur skoða lið í lið

kertiljós á lívsins gøtum
avmarkaða virkistíð
til hvíldarstað á føgrum gøtum
eftir lokið dagsins stríð